

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum framleiddi 1233 føt um dagin í november

**Jógvan Hugo Gardar**

03.12.2015 - 09:45

Oljan.fo

Atlantic Petroleum boðar frá at í november, so hevur fyritøkan framleitt 37.000 føt av oljulíkum, svarandi til 1233 føt av oljulíkum um dagin, á økjunum Chestnut, Ettrick og Blackbird. Í oktober var framleiðslan 45.000 føt av oljulíkum,ella 1452 føt um dagin, og í september var framleiðslan 33.000 føt, ella í meðal 1100 føt um dagin.

Atlantic Petroleum eigur í løtuni í 34 olju- og gassloyvum í bretskum, írskum og norskum sjógvi. Í løtuni er framleiðsla á teimum trimum Chestnut, Ettrick og Blackbird. Harafturat er eitt loyvi har ætlanin er at byrja framleiðsluna í 2016.